## SJÓBJARGINGARSTØÐIN
## MRCC- Tórshavn

**Tlf: 00298-351300 * Fax: 00298-351301**
**Inmarsat C: 492 888 021**
**www.mrcc.fo email: mrcc@mrcc.fo**
**AFTN: EKTNYCYX**

# Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður at seismiskar kanningar verða gjørdar innan fyri hesar knattstøður:

| Øki 1 | Øki 2 |
|---|---|
| 61 19,0 N 004 07,0 W | 61 32,0 N 003 43,0 W |
| 61 11,0 N 004 18,0 W | 61 25,0 N 003 52,0 W |
| 61 04,0 N 003 59,0 W | 61 19,0 N 003 38,0 W |
| 61 12,0 N 003 49,0 W | 61 26,0 N 003 27,0 W |

Felagið Chevron kannar økið.

Byrja verður ................................................21.08.2008
Arbeiðið tekur væntandi ............................3 vikur
Skipanavn..................................................Sea Surveyor
Kallibókstavar.............................................C6QL6
Heimstaður.................................................Bahamas
Fiskiveiðiumboð ........................................Absalon Eliasen

Samband fæst við skipið á VHF rás 16.

Upplýsingar um arbeiðið fáast frá Tórshavn Radio, á heimasíðuni hjá MRCC - Tórshavn, www.mrcc.fo, ella á telefon 351302.

Lesið Sosialin -tað loysir seg

um... Sosialurin Sosialurin Sosialurin ...er lisin -so ert tú við!

# Tvøroyrar Kommuna

## Kunngerð um býarplansbroyting

Um broyting av Býarplaninum fyri Tvøroyrar Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 seinast broytt 13. mai 1997, verður við hesum boðað frá, at Býráðið á fundi 05-05-2008 hevur samtykt at gera broytingar í býarplaninum í Froðba.

Broytingin í Froðba umfatar nýtt A-øki á E1-økinum á matr. nr. 139b og nýtt E1-øki á part av A-økinum á matr. nr. 87a.

Broytingarnar eru til skjals á býráðsskrivstovuni í upplatingartíðini frá 25. august 2008 til og við 15. september 2008.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu verða býráðnum í hendi í seinasta lagi 24. november 2008.

*Tvøroyri, tann 19. august 2008*

**Tvøroyrar býráð**



## Tvíhús til sølu á Heygsvegnum 16 Tórshavn

Talan er um eini nýgg tvíhús har alt er gjørt bæði innan og uttan.

Húsini eru í tveimun hæddum, á veghæddini eru 3 kømur, baðiverilsi, bryggers og gongd, á 1. hædd er stova og køkur við atgongd til altan, kamar við atgongd til altan og baðirúm.

Húsini liggja væl fyri, 10.min oman í býin, sera góðan sólargang og gott útsýnið.

Húsini verða seld um hóskandi boð fæst, minsta boð er 2.450.000 kr.

**VALBJØRN DALSGARÐ**
RYGSGØTA 20 FO-160 ARGIR
TLF 319279 MOBIL 512118 FAX 312118
MAIL VALBJORN@VALBJORN.FO
WWW.VALBJORN.FO

# Frá Barnagarðinum á Teiginum á Sandi:

### Leiðari, 2 hjálparfólk og reingerðarfólk

Vegna farloyvi eru hesi størv leys at søkja:

### Leiðari 40 t/viku

Av tí at dagligi leiðarin fer í farloyvi 1. september og eitt ár fram, sóknast vit eftir avloysara til starvið.

Sum leiðari hevur tú fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av dagliga rakstrinum av stovninum og ábyrgdina av dagligu pedagogisku leiðsluni á stovninum.

Barnagarðurin er sjálvsognarstovnur, sum er stýrdur av 5 manna nevnd.

**Krøvini til tín:**
Tú skal verða námsfrøðingur. Tú skal hava kunnleika til roknskap, góðan telduførleika, góð evni til at samskifta inni á stovninum, við starvsfólk og foreldur eins væl og við aðrar samstarvsfelagar hjá barnagarðinum. Tú skal hava góð evni til at samstarva. Tað er til fyrimuns um tú hevur leiðsluroyndir.

Á stovninum starvast 3 pedagogar og 9 hjálparfólk. Stovnurin er normeraður til 55 børn. Stovnurin lat upp 1. februar í 2001.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF/Fíggjarmálaráðið, á lønarstigi 21-27.

### 2 Hjálparfólk

Tvey av hjálparfólkum okkara fara í farloyvi í eitt ár, frá 1. September 2008 at rokna og søkja vit tí eftir avloysarum fyri tey. Størvini eru ávíkavist 25 og 35 tímar/viku.

**Krøvini til tín eru:**

- at tú er fyrikomandi og erlig/ur
- at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar.
- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú heldur arbeiði við 0-9 ára gomlum børnum vera spennandi og avbjóðandi.
- at tær dámar at verða úti í øllum veðrið.
- at tú dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar.
- at tú er nærverandi og dugir at lurta.
- at tú vil verða við til at menna barnagarðin og tað arbeiði vit hava sett okkum fyri í endamálorðingunum fyri einstøku bólkarnar.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF/Fíggjarmálaráðið, á stigi 1-7.

Í løtuni røkja avloysarar størvini.

### Reingerðarfólk 20 t/viku

Søkt verður eftir avloysara fyri reingerðarfólk okkara sum fer í farloyvi í 1 ár, frá 1. September 2008.

Starvið umfatar dagliga reingerð av stovninum sambært lagdari arbeiðsskrá. Arbeiðstíðin er millum kl. 17.30 og 21.00.

Tú fært nærri upplýsingar um størvini, um tú vendir tær til Randi í Soylu Joensen, varaleiðara á tlf. 361750/212750.

Skrivlig umsókn við prógvi og møguligum viðmælum, skal sendast til Sjálvsognarstovnin Barnagarðin á Teiginum, Koytugøta 1, FO-210 Sandur. Allir umsøkjarar fáa svar.

Umsóknarfreistin er úti 2. september 2008. Størvini verða sett 15. September.

**Sjálvsognarstovnurin**
**Barnagarðurin á Teiginum**